# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TØRVUR Á ENDURNÝGGJAN

Í blaðnum í síðstu viku fegnaðust vit um, at ungdómur hevði tikið seg saman at mótmæla uttan fyri løgtingið. Orsøkin var, at útbúgvingarstuðulin skuldi skerjast.

Tað er so hugaligt, at vit aftur hoyra, at politisk ungmannafeløg kalla til fundar. Meðan ungdómsvirksemið hjá politisku flokkunum hevur ligið so at siga deytt í fleiri ár, so tykjast nú flestu flokkar at hava kveit lív aftur í politisku ungmannafeløgini.

Og tað er bara gott. Tað er gott, at ungfólk hava áhuga fyri politikki, tí vit mugu ikki koma aftur í ta vanlukkuligu støðuna frá nítiárunum, tá »politikaraleti« valdaði - tá fólk vóru so troytt av politikarunm, at tey ikki vildu fáast við politikk - og tá fólk felst hildu hánt um politikk og politikarar. Hetta sást best á løgtingsvalinum í kreppuni í 1994, tá politiskir fundir vórðu hildnir fyri nærum tómum salum - og tá toppskorarin á valinum bara fekk góðar 600 atkvøður.

Nógv vatn er runnið í ánni síðani tá. Vit hava havt góðar tíðir og vit hava havt verri tíðir. Sum støðan er nú tykist naggatódn at valda í politisku skipanini: Nógvar djarvar avgerðir eru tiknar síðani kreppuna. Vit hava sagt frá okkum triðingin av ríkisveitingini, og vit hava tikið yvir fleiri málsøki við tí erpna endamálinum, at vit sjálvi skulu valda og gjalda.

Men meðan politiska skipanin í offarakæti hevur dansað um gullkálvin, so hava tey gloymt, at erpnu avgerðirnar um at frásiga sær pengar og at átaka sær fleiri uppgávur krevja ábyrgdarfullar politikarar, sum duga at umfordeila soleiðis, at landskassin fær aðrar inntøkur í staðin. Hetta hevur hesa vikuna ført við sær, at ein landsstýriskona ætlaði at taka náttarvakt frá gomlum og sjúkum fólkum. Men eftirsum at hon »ikki visti, hvussu álvarsligar avleiðingar sparingin fekk«, varð hetta broytt í løgtinginum í gjár. Spurningurin er so, um tað er politiskt ella umsitingarligt dugnaloysi sum valdar í Almannaráðnum, tá slíkt hendir.




Í blaðnum mikudagin kom miðfloksungdómur við uppskoti um, at útbúgvingarstuðul skal veitast eftir dugnaskapi - hvussu góðan karakter tú fært í skúlanum. Jú, eitt kreativt uppskot, hóast asosialu avleiðingarnar av tí valla eru kannaðar til botns - men tað er bara gott við ungdómi í politikki, tí tað er sjón fyri søgn hvussu keðiligir og beinleiðis vandamiklir politiskir flokkar kunnu blíva, sum ikki duga at endurnýggja seg.

Vit hava brúk fyri góðum, frískum politikarum, sum duga at føra ábyrgdarfullan politikk, tí vit stevna móti eggini - eina og aleina av politiskum dugnaloysi og ábyrgdarloysi.

## Politiskt ella umsitingarligt dugnaloysi hjá Rósu?

## Blikk, fløskur og dunkar bannað í Gundadali

FSF, B36 og HB hava í felag gjørt av, at allar fløskur, øll blikk, allir dunkar - og hvat annars kann hugsast av sovorðnum - eru bannað á Stadionøkinum til stórdystin millum HB og B36 leygardagin kl. 15.

- Vit heita tí inniliga á øll um at virða hesa avgerð og bert hava sítt góða lag og ikki løg við í Gundadal, Fótbóltssambandið, B36 og HB í áheitan.



## Kendur kokkur og lærari leggur frá sær

Jákup Ziskason, sum er væl kendur innan kokkayrkið, hevur verið lærari á Kokkaskúlanum í Klaksvík í teimum skiftum. Hann byrjaði á Kokkaskúlanum í 1972 og helt so fram í 13 ár. Síðani tók Jákup við aftur í 1994, og gevst nú pr. 1. november.



Í sambandi við at Jákup Ziskason fer frá sum lærari á Kokkaskúlanum, var móttøka á Klaksvíkar Sjómansskúla í gjár millum kl. 15 og 17; har hópin av fólki nýtti høvi at heilsa uppá Jákup og takka honum fyri gott arbeiði og annars ynskja honum eina góðan framtíð.

Eisini kom fram hvussu nógv og ymisk tiltøk innan kokkayrkið Jákup hevur skipað fyri og sett á stovn, og at hann hevur hópin av frítíðaryrkum, so sum seyð, skiing og fótbólt, at ganga uppí.

Kokkaskúlin hevur verið partur av Klaksvíkar Sjómansskúla til 1. august 2010, tá hann varð lagdur undir Tekniska Skúla í Klaksvík – Heitið eftir útbúgvingina er nú marvøruástøðingur. Í løtuni ganga 28 næmingar til hesa útbúgving, sum eru býttir upp í tveir flokkar. Næmingarnir halda til á Klaksvíkar Sjómansskúla og eru bert fríggjadag á Tekniska Skúla.

Mynd: Dávur Winther



### Náttartænastan halda fram

VÁR Í GONG
KJAK Á SÍÐU 15



### Tankar um Jenis og Nólsoyar Páll

SÍMUM ABSALONSEN
KJAK Á SÍÐU 25

## Bill legðist ikki á boðini Rúsuna



Beinanvegin Rás2 og Portalurin bóru tíðindini um, at Rúsan skjótt fer at lata handil upp í SMS, settist Bill Justinussen, løgtingsmaður fyri Miðflokkin, við telduna.

Í hesum sambandi ætlar hann at reisa málið í Løgtinginum har hann fer at spyrja Johan Dahl, landsstýrismann, fleiri spurningar um ætlanina.

Hann vil hava at vita, um landsstýrismaðurin tekur undir við at Rúsan letur handil upp í SMS, nær handilin verður latin upp og hvussu nógv, hann væntandi fer at selja fyri.

Hann vil eisini hava at vita, um Johan Dahl heldur, at tað er í samsvari við rúsdrekkalógina at økja um útboðið av rúsdrekka, hóast Rúsan skal virka tálmandi upp á nýtsluna.

- Eftir øllum at døma ger Rúsan ov nógv fyri at økja um nýtsluna av rúsdrekka fyri at røkka avlopskravinum í fíggjarlógini.

- Avlopskravið er sjálvandi ein ómøgulig tvístøða fyri Rúsuna. Tað er ómøguligt at miðja ímóti at selja minni, samstundis sum roynast skal at selja meiri. Tí er neyðugt, at politiski myndugleikin beinanvegin loysir Rúsuna burturúr hesi tvístøðuni. Tað kann gerast við at flyta príspolitikkin til landsstýrismannin í fíggjarmálum, sum umsitur avgjaldspolitikkin.

- Rúsan skal undir ongum umstøðum nýta sína orku til at royna at fáa fleiri at drekka meiri. Rúsan skal halda seg til upprunaendamálið, sum er at tálma nýtsluni, sigur Bill Justinussen.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*